# Miseydnað roynd at rógva til Hetlands

**Leygardagin fór kappróðrarbáturin Norðingur úr Hvannasundi. Umborð vóru níggju treystir menn, má sigast, tí ætlanin var at rógva úr Føroyum til Hetlands. Onki hevur verið gjørt burtur úr hesum, tí menn vistu frammanundan, at møguleikarnir fyri at megna tað, vóru avmarkaðir hesa ársins tíð**

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Norðingur á veg út úr Hvannasundi leygardagin. Teir róðu góðar 40 fjórðingar men gjørdu síðani av at gevast, tí veðurlíkindini vóru ikki við teimum*
*Mynd: Kristian E. Zachariassen*

**Klaksvík:**
Ætlanin um at fara at rógva niður til Hetlands kom spakuliga fram í kappróðrarneystinum í Klaksvík fyrr í summar. Menn tosaðu nógv um tað, men teir gjørdu ikki nógv burtur úr tí. Tí at teir vistu ikki, hvussu tað fór at ganga.

Men so leygadagin vóru allar fyrireikingarnar lidnar, og Norðingur kundi so fara úr Hvannasundi. Við teimum sigldi Jógvan S.

Tað gekk gott um dagin. Teir høvdu eitt lítið viðrák, og báturin gekk við hampuligari ferð. Men seinni út á kvøldið fingu teir mótvind. Og hetta helt á alt kvøldið, náttina og morgunin við.

Tá byrjaðu menn at tosa um, hvussu longi kreftir fóru at vera til tað, so teir ringdu umborð á Jógvan S og bóðu teir kanna veðurtíðindini.

Boð komu aftur av Jógvan S um, at hann møguliga fór at minka vindin, men lotið í móti fór at standa við. Teir róðu so aftur ein tein, men so komu aftur boð frá Jógvani S um, at hann fór at fara yvir í landsynning. Og tað merkti beint í móti, og so gjørdu teir av at gevast.

– Vit vistu tá, at vit fóru at orka tað í eina nátt afturat, men um tað fór at blíva við í fleiri dagar, so var spurningurin, hvussu longi kreftirnar fóru at halda til tað, sigur Fróði Waag, sum er ein av teimum níggju.

Hann sigur, at teir satsaðu upp á at fáa viðrák meginpartin av teininum. Og soleiðis hevði tað eisini sæð út, men so broyttust veðurlíkindini, og gjørt var av at gevast.

– Tað var ongantíð vandi á ferð ella nakað. Og veðrið var gott, so tað einasta, sum vit høvdu ímóti okkum var hesin ólukku mótvindurin, sum terir so nógv upp á kreftirnar, sigur hann.

Hann greiðir frá, at við viðvindi, høvdu teir væntað, at túrurin fór at taka umleið fýra ella fimm dagar. Men í mótvindi kundi tað lættliga blíva til einar átta ella níggju.

### Royna aftur

Menn hava tó ikki mist mótið av hesum. Fróði sigur, at teir hava ætlanir um at royna aftur. Men tað verður so ikki í ár.

– Møguliga komandi summar. Tað liggur so í øllum førum í luftini, sigur Fróði. Hann heldur ikki, at tað var ov langt útliðið í ár.

– Vit høvdu ikki gjørt hetta, um vit hildu tað, sigur hann, men ásannar tó, at møguleikarnir fyri longri tíðarskeiði við góðum veðri er nógv betur á sumri.

Hann sigur, at teir nú eisini eru betur fyrireikaðir til eina aðru ferð. Hava fingið eina vitan, sum teir ikki høvdu frammanundan um so at siga øll viðurskiftini viðvíkjandi einum tílíkum túri.

Fróði sigur at enda, at hetta er nakað, sum teir hava tosað um so at siga á hvørjum ári, meðan hann hevur róð. Tað er ikki nakað beinleiðis endamál við túrinum, uttan at teir sjálvir fáa nakað burturúr.

– Men vit hava fingið stuðul hesuferð upp á ymsar mátar, og tað eru vit sera takksamir fyri. Serliga fyri at Jógvan Lützen lagaði tað soleiðis til, at Jógvan S kundi sigla við okkum, tí uttan hann hevði henda royndin uttan iva verið av ongum, sigur Fróði Waag.




# Oljan hækkað eftir avgerð frá OPEC

MARKNAÐARRÁK

Á fundi 24. septembur avgjørdi OPEC, at framleiðslan hjá limalondunum skal skerjast við 3,5% ella 900.000 tunnum dagliga. Orsøkin er, at oljuprísurin í septembur lækkaði um 16% niður í 25 dollarar fyri tunnuna. Samstundis er OPEC órógvað av, at framleiðsluevnini hjá Irak alsamt økjast, og at oljugoymslurnar í USA eru á tremur. Avgerðin førdi við sær, at oljuprísurin hækkaði um 4% í 27 dollarar. Eftir avgerðin hjá OPEC, fullu bæði partabrøv og lánsbrævarentur. Orsøkin er, at orka stendur fyri stórum parti av útreiðslunum hjá virkjum og einstaklingum, og ein hækkani oljuprísur virkar tískil sum ein búskaparlig táttan.

Marknaðarrák metur tað ósanlíkt, at boðini frá OPEC til limalondini fær nakra ávirkan á framleiðsluna sum frálíður. Oljumálaráðharrin í Noreg segði eftir OPEC fundin, at Noreg ikki sær nakra orsøk til at skerja framleiðsluna, og samstundis vilja lond, sum ikki eru limir, m.a. Russland, framleiða sum teimum lystir. Oljuveitingin til marknaðin vil tískil neyvan fella sum frálíður, og oljuprísurin vil tískil, ikki tálma búskaparlig gongdini í USA og Evropa.

Nú 3. ársfjórðingur er liðin, má staðfestast, at hesin gjørdist góður fyri partabrævaeigarar. Kortini hava teir seinastu dagarnir verið truplir. Orsøkin er, at eitt sindur av fjáltri er komið í íleggjarar eftir at búskaparligar uppgerðir, serliga úr USA, seinastu vikurnar hava verið heldur lakar. Spurningurin er tí settur, um partabrøvini sum heild eru hækkaði ov nógv og ov skjótt seinastu mánaðirnar. Partur av hesum spurninginum kann svarast seinni í hesari vikuni.

Hesa vikuna koma fleiri áhugaverdar búskaparligar uppgerðir úr USA, og Marknaðarrák metur, at vikan kann gerast skiftandi. Fríggjadagin kemur mánaðarliga frágreiðingin um støðuna á arbeiðsmarknaðinum. Hendan er sera týdningarmikil, tí hóast betur gongur í amerikanska búskapinum, eru arbeiðspláss ikki skapt í seinastuni. Niðurstøðan í frágreiðingin verður avgerandi fyri hvussu láns- og partabrævamarknaðirnir enda hesa vikuna. Væntað verður at arbeiðspláss aftur fóru fyri skeyti í september, men um hesi verða færri enn væntað, kann frágreiðingin tó hava positiv árin á marknaðirnar.

Í næstu viku byrja roknskaparkunngerðirnar fyri 3. ársfj. av álvara. Hetta kann tálma kursgongdina hesa vikuna nakað. Marknaðarrák metur, at mest talar fyri, at tølini fyri hendan ársfjórðingin gerast eins góð sum seinasta ársfjórðing.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,64% | -0,07% |
| 5 ára lánsbræv | 3,46% | -0,09% |
| 10 ára lánsbræv | 4,27% | -0,07% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 245,4 | -0,2% |
| OMX, Svøríki | 584,3 | -0,9% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.457,0 | -1,2% |
| S&P 500, USA | 996,9 | -2,5% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 107,06 | 0,0% |
| Evru Lánsbrøv | 164,78 | 0,2% |
| Norrøn Partabrøv | 68,33 | -0,3% |
| Altjóða Partabrøv | 68,19 | -0,5% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 650,87 | 0,4% |
| EUR | 742,62 | 0,0% |
| GBP | 1.073,90 | 0,5% |
| NOK | 91,60 | 0,7% |

*Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Halgir Winther Poulsen 65 ár



Mánadagin, 29. september, á mikkjalsmessu, fylti Halgir W. Poulsen advokatur í Havn 65 ár. Halgir er skopuningur, sonur Kristionnu, f. Mikkelsen, av Tvøroyri og Niels Winther Poulsen, úr Skopun.

Hann tók sína advokatútbúgving í Keypmannahavn og arbeiddi í nøkur ár sum advokatfulltrúi á advokatskrivstovu hjá Mogens Glistrup, áðrenn hann flutti heim aftur til Føroya.

Síðan seinnu helvt av 60-unum hevur Halgir arbeitt sum advokatur í Havn. Hann er ein kendur og avhildin advokatur, sum dugir sera væl at argumentera fyri sínun sjónarmiðum og tosar um løgfrøði, soleiðis at vanlig fólk skilja tað. Hann fylgir væl við í tí sum fyriferst, bæði úti og heimi.

Hann hevur luttikið í nógvum nevndararbeiðum, sum hava havt stóran samfelagsligan týdning, sum t.d. um yvirtøku av undirgrundini, marknaðarsamráðingum millum Føroyar og Bretland, og var hann við í oljuráðleggingarnevndini.

Hann var við í nevndini sum skrivaði hvítubók. Eisini var hann formaður í nevndini, sum fyrireikaði yvirtøkuna av skipasýninum.

Eitt tíðarskeið í seinnu helvt av 90-unum las hann altjóðarætt í London.

Hann hevur verið virkin innan Amnesty International-Føroya Deild, har hann hevur verið nevndalimur og formaður. Hann var í nógv ár formaður í nevndini í Føroya Sparikassa.

Saman við ørðrum eigur og rekur Halgir advokatskrivstovuna í Fr. Petersensgøtu í Havn.

Hann er giftur við Ásu Ellefsen, ættað úr Miðvági, dóttir Sofíu, f. Højgaard, og Joen Elias Ellefsen í Miðvági. Ása og Halgir eiga børnini: Elin, Niels, Jógvan Elias og Kristionnu.

### Óli í Hjøllum 55



Í gjár, 26. september, fylti Óli í Hjøllum í Porkeri 55 ár. Hann varð føddur á Toftum, sonur Elsu Poulsen av Skipanesi og Jens Jacob í Hjøllum av Toftum.

Óli tók læraraprógv í Havn í 1971 og var síðani lærari á Toftum til 1987. Áðrenn hann fór úr starvi har, hevði hann verið varaskúlastjóri í eitt ár og skúlastjóri í eitt ár.

Hann flutti til Porkeris og var lærari har í eitt ár. Í 1988 tók hann við sum skúlastjóri í Vági. Hann er giftur við Jónhild Bech úr Porkeri.

### Róland Nónfjall 55



Mánadagin 29. september fyllir Róland Nónfjall í Sumba 55 ár. Hann varð føddur í Hvalba, sonur Magnu Jacobinu Ellendersen og Poul Jóhannes Nónfjall.

Hann tók læraraprógv á Ranum Seminarium í 1973 og hevur verið lærari í Sumba síðani. Hann hevur verið á fleiri stuttum skeiðum í føroyskum, donskum og matematikk.

# Prógv sum stálskipasmiðir



*Fríggjadagin 26. september fingu tríggir stálskipasmiðir prógv á Tekniska Skúla í Havn.*
*Teir vóru: Claus Hadberg, Skála, Petur Oluf Jacobsen, Klaksvík, og Árant Kjeld, Funningsfjørður. Allir hava teir lært á Skála Skipasmiðju.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Dagurin

**30. september. Hieronymus,** deyður í 420. Tann lærdi kirkjulærarin, sum var komin úr Stridon í Bosnia. Í Róm var hann skrivari hjá pávanum Damasusi Fyrsta, sum setti hann at týða bíbliuna av nýggjum. Úrslitið var tann latínska bíblian Vulgata, ið enn verður nýtt í katólsku kirkjuni. Vulgata merkir tann, ið vanliga verður nýtt. Hieronymus doyði sum abbati í einum kleystri í Betlehem. Saman við Ambrosiusi, Augustinusi og Gregori ein av katólsku kirkjufedrunum.

**Sosialurin**
– hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

**Internet Sosialurin**
www.sosialurin.fo